



## Vit leita eftir tær

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Vit vænta at tú ert lívlig/ur og óhátíðarlig/ur. Tú ert ein eldhugaður bólkaspælari og kennir, at sjálvsábyrgd og góð tillagingarevni skapa íblástur.

Vit vilja skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast. Vit leggja serstakliga dent á opið og ærligt prátingarlag. Tað er við til at menna felags hugburð millum starvsfólk og kundar.

Við einari útbúgving úr Føroya Sparikassa fært tú eisini førleika til at starvast innan aðrar vinnur. Ella tú kanst brúka útbúgvingina sum lopfjøl til víðari útbúgving. Tó fara vit sjálvandi at stremba eftir, at tú framhaldandi vilt vera á okkara liði, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Sparikassin hevur eisini fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

Í næmingatíðini ert tú við í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar, eru vælkomnir at søkja.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, tlf. 348510.

Send umsóknina við avriti av próvskjølum til adressuna, nevnda niðanfyri, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 4. apríl 2002 kl. 18.00.

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

www.sparikassin.fo
E-mail: steinbjorn.hardlei@sparikasssin.fo

REPRO-Z 319540

FØROYA SPARIKASSI

Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visión Sparikassans, sum er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Ætlanin er at seta næmingar á deildunum í Tórshavn, Vestmanna og á Tvøroyri.




FAREC-ráðstevnan á Hotel Føroyum:

# Føroyingar komu fyri at fáa rós

FISKIVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*




*Eg sigi ikki at føroyska fiskivinnan er tann besta, men mín kanning vísir, at hon hevur havt størstu framgongdina í kanningarskeiðnum, segði Óli Samró*

Tað besta fólkameingið innan fiskivinnuna varð savnað saman, tá Jørgin Niclasen, fiskimálaráðharri setti fiskivinnustevnuna, sum FAREC við Óla Samró á odda skipaði fyri fríggjadagin. Og tað kundi næstan sæð út sum at føroyingar vóru komnir fyri at fáa rós. Frammanundan vistu teir, at kanningin hjá Farec seinastu trý árini av fiskivinnunum í Føroyum, Noregi og Íslandi gav føroyingum eitt sera gott skoðsmál, meðan karakterurin hjá íslendingum var miðal og heilt í botni hjá Norðmonnum. Ella sum fiskimálaráðharrin lýddi mær í oyra uttanfyri fundarhølið: "Hetta er hugaligt fyri okkum."

– Tá í høvuðusvinnan gevur pening, so geva vinnurnar, sum eru knýttar av hesi eisini. Soleiðis er tað, tá vinnurnar ikki eru knýttar saman av somu eigarum, men kappast og tað er júst tað sum hendir í Føroyum í løtuni, segði Óli Samró, sum hevur staðið fyri kanningini hjá Farec.

– Í 1996 gav fiskiskapurin á nærleiðunum undirskot, á miðleiðunum eitt lítið yvirskot og tað sama á fjarleiðunum. Í dag gevur fiskivinnan yvirskot sum heild og hetta kemst av, at tað eri ein fullkomilig hugburðsbroyting hendi í føroysku fiskivinnuni seinastu árini. Eg sigi ikki at føroyska fiskivinnan er tann besta, men mín kanning vísir, at hon hevur havt størstu framgongdina í kanningarskeiðnum, segði Óli Samró, tá hann legði kanningarúrslitini fram.

– Hugburðurin og útgangsstøði er so ymisk í hesum trimum londunum, at talan kundi verið um tríggjar ymiskar heimspartar. Í íslandi verða serlig atlit tikin til tey, sum eiga partabrøvini í fiskivinnuni, í Noregi verður serliga hugsað um at varðveita búsitingarmynstri meðan í Føroyum er eindarhugsanin galdandi.Tað vil siga, at her syrgir virkið, skip og vinnur knýtttar at fiskivinnuni fyri at standa seg, skilt frá hvørjum øðrum. Í flotanum er tað næstan óhugsandi í Føroyum, at trolaraeigarar fáa sær línubátar ella øvugt. Tey íslendsku fiskiskipini geva nógvan pening. Men hetta kemst av, at tey hava nógv størri kvotur. Ein íslendskur feksfiskatrolari veiðir í meðan yvir 5000 tons um árið, meðan ein føroyskur veiðir í meðal eini 1800 tons. Hóast hetta, so er fíggjarliga úrslitið roknað upp á tons munandi betri fyri tann føroyska, segði Óli Samró.

– Við undantaki at uppisjógvaflotanum, so er lønsemi og kappingarføri í norska fiskiflotanum sera vánaligt. Hóast hetta so eru skip og virkið í Noregi nýggjari enn í Føroyum og Íslandi. Hetta kemst av studningi til fiskivinnuna.

– Høvdu føroysk virkir møguleika at keypa fisk eins bíliga og norsk og íslendsk, so høvdu einstøk feløg komið út við einum úrslitið sum lá omanfyri 100 milliónir. Hetta er sjálvandi stuttskygt at siga, um so var, so hevði eisini kappingarførið rokið niður. Høvdu íslendsk skip fingið føroyskan prís fyri fiskin, so høvdu tey havt eitt risayvirskot, segði Óli Samró.

Kanningin hjá Óla Samró byggir á hópin av roknskapum hjá skipum og virkjum í hesum trimum londum.

– Øll lið í føroysku fiskivinnuni miða í móti at vinna pening. Vinnan er mannað av vinnarum, ikki grátikonum. Teir føroyingar sum yvirlivdu kreppuna eru so væl trimmaðir í dag, at alt óneyðugt feitt er skorið burtur og eg fari at rósa politikkarunum fyri at hava hildið seg burtur frá fiskivinnuni. Eisini er infrastruktururin í Føroyum munandi batnaður seinastu árini. Fyristilli tykkum í vetur, at allir lastbilarnir stóðu fastir í Kollfjarðardali, tí ikki var koyrandi eftir Oyggj. Tveir undirsjóartunnlar eru á veg og sjálvsagt má ein fiskivinnutjóð hava gott vegasamband. Vit liva jú av fiskivinnu, segðii Óli Samró.

Vit fara í komandi bløðum at greiða meira frá fiskiráðstevnuni á Hotel Føroyum.

Jørgen Niclasen:

# Fiskivinnan skal fáa frið

FISKIKVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*




*Í fríheit liggja vit millum Noreg og Ísland,og tað skulu vit halda fram við, segði Jørgen Niclasen*

Ein fiskivinnupolitikk, har myndugleikarnir blanda seg sum minnst upp í raksturin av fiskivinnuni, er málið hjá landsstýrinum og tað vísti Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri á, tá hann setti fiskivinnuráðstevnuna sum Farec skipaði fyri á Hotel Føroyum fríggjadagin.

– Í fríheit liggja vit mitt í millum Noreg og Ísland og tað skulu vit halda fram við. Í Íslandi er alt frítt og Noregi er alt bundið niður, segði Jørgen Niclasen.

Jørgen Niclasen spáddi at oljuvinnan fer at geva fiskivinnuni kapping um, fólkið.

– Tí mugu treytirnar hjá fiskivinnuni gerast betri og hesum náa vit bert við lønsemi. Tey politisku málini kunnu bert náast við kapping og lønsemi, segði Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri


## Stórur brúktbila-marknaður

**Mazda 323 HB 1,3 LX**
bláur, 5 hurðar,
5 gear, árg. 09/85



5.000,-

**Mazda 323 S 1,5i LX**
reyður,4 hurðar,
5 gear, km 69.000,
árg. 05/97



Sýnaður 02/02
~~90.000,-~~
78.000,-

**Mazda 323 S 2,0 Diesel LX**
gráur, 4 hurðar,
5 gear, km 84.000,
árg. 09/85



105.000,-

**Mazda 323 S 1,3 LX**
bláur, 4 hurðar,
5 gear, km 196.000,
árg. 04/87



Sýnaður 08/01
15.000,-

**Toyota Corolla 1,6 Luna**
reyður, 5 hurðar,
5 gear, km 38.000,
árg. 04/98



~~122.000,-~~
98.000,-

**Renault Megan 1,4e**
grønur, 5 hurðar,
5 gear, km 34.000,
árg. 08/98



~~110.000,-~~
94.000,-

**Mazda 323 S 1,3 LX**
reyður, 4 hurðar,
5 gear, km 136.000,
árg. 1987



Sýnaður 02/01
~~10.000,-~~
6.000,-

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35